Ein háðan móti mammuni og heiminum

Bill Justinussen
valevni Miðfloksins

Á veljarafundi í Eysturoynni spurdi eitt valevni Tjóðveldisfloksins, hvør skuldi gjalda fyri, at helvtin av føroyingum skuldi sita og nina hvørjumøðrum og nevndi í hesum sambandi familju-politikk Miðfloksins. Ein býttur spurningur, sum ikki er verdur svar. Men tá tíðin var ov stutt at greiða eysturoyingum frá, hvussu einfalt ansingarspurningurin verður loystur, skal tað her verða gjørt.

Fyrst skal tó viðmerkjast, at mamman, sum er heima og ansar børnunum, meðan pápin vinnur til lívsins uppihald, er góð føroysk mentan. Hesa mentan hevur tann flokkurin, sum ætlar at gera samfelagið meiri føroyskt, háðað. Samstundis hevur hann sagt sína meining um, hvussu lítið hann virðir tað týdningarmiklasta arbeiði í samfelagi okkara, nevniliga at geva børnum okkara tið, umsorgan og kærleika.

Ansingin er longu figgjað

Smb. svari frá figgjarmálaráðharranum um hjúnarskatt, eru bert 379 hjúnafelagar ídag, sum ikki hava inntøku. Tað merkir, at so at siga allar mammur og allir pápar eru úti á arbeiðsmarknaðinum so ella so.

Hvør ansar teirra børnum? Tað gera ansingarstovnar, dagpleygumammur v.m.

Hvør rindar fyri tað? Foreldrini gjalda 35% og land og kommunur 65%.

Tað vil siga, at so at siga øll barnaansing longu í dag verður figgjað smb. galdandi lógum, og skal tí ikki nógvur peningur játtast afturat, inntil ansing til ØLL BØRN Í FØROYUM er figgjað.

Stuðulin skal fylgja barninum og ikki stovninum

Eitt høvuðsorð í politikki Miðfloksins er VALMØGULEIKIN. Eitt ansingarpláss kostar tí almenna uml. kr. 3.200 um mánaðin. Hugsa tær, um tú eigur tríggjar børn, og tú hevði fingið kr. 9.600 frá tí almenna hvønn mánaða til ansing fyri hesi børn. Tað er jú tað, sum hendir í dag, bara fær stovnurin peningin í staðin fyri tú. Um lógin broyttist til, at stuðulin skal fylgja barninum, hevði tú fritt kunnað valt, hvussu tú vildi brúkt peningin.

- Tú kundi givið barnagarðinum peningin, og fingið børnini ansað har
- Tú kundi valt at verið heima hjá børnunum og soleiðis fingið lønina sjálv/ur
- Tú kundi latið eini dagpleygumammu peningin og fingið børnini ansað har
- Tú kundi latið ommuni, abbanum ella onkrum øðrum peningin og soleiðis fingið børnini ansað

Familju- og trivnaðarmálastýrið

At seta hesa skipan í verk verður ein av uppgávunum hjá familju- og trivnaðarmálastýrinum. Hetta kostar so at siga onki eyka, og kann tí spurningurin um, hvussu tað skal figgjast, vera ein forðan. So greiður er politikkur Miðfloksins. Men tað er upp til tín, góði veljari, um hetta skal gerast møguligt. Tað kann tað við at velja Miðflokkin.

Miðflokkurin og Suðuroyggin

Petur Karl av Rana
Valevni Miðfloksins í Suðuroy

"Jú, tað leggja okur merki til, Miðflokkurin hevur altíð stuðla Suðuroynni, tá mál hava verið á skránni, sum viðvíkja oynni"- hetta er beinleiðis endurgivið frá manni, je tosaði við ein av farnu døgunum.

Óivað hugsaði hann um viðgerðina á løgtingi av oljuútgerðarhavnini, har Miðflokkatingmaðurin manniliga stríddist fyri at leggja hesa í oynni, argumenteraði við, at hetta vildi verið útjaðarapolitikkur í verki og ikki bert orðum.

Men tíverra batti tað lítið, tí teir flokkar, sum við valið høvdu fingið atkvøðurnar og álit frá suðuroyingum, teir sviku og sleptu oynni upp á fjall.

Sambandsflokkurin lovaði á fundi í Øravík at stuðla, men á løgtingi atkvøddu allir uttan ein nei!

Fara suðuroyingar at gloyma hetta 30. apríl?

Fólkaflokkurin fekk 494 atkvøður frá suðuroyingum fyri at tosa søk teirra á løgtingi, lagnudagin, tá oljuútgerðarhavnin var til viðgerðar, atkvøddu allir fólkakloksmenn nei!

Fara suðuroyingar at gloyma hetta 30. apríl?

Tjóðveldisflokkurin lovaði høgt og heilagt at fáa oljuvirksemi í oynna, tá atkvøtt varð á løgtingi, taldust bert tvær tjóðveldisatkvøður fyri hesum!

Fara suðuroyingar at velja hesar aftur 30. apríl?

Jú mangt er løgið, so løgið tað ljóðar kann væl hugsast, at hesir flokkar aftur megna at blinda suðuroyingar at velja seg. Tó, løgið um søgan ikki talar sterkari enn tómu orð og lyfti teirra!

Hevði Miðflokkurin átt tær 300-400-500 atkvøðurnar, hinir flokkarnir fingu við valið í ´98 og harvið ein tingmann fyri Suðuroynna, so skuldi veruleikin sæð øðrvísi út. Tí tá hevði oyggin átt eitt talirør, eitt umboð á løgtingi, sum íðið vildi virka fyri oynni.

Hugsa um søguna, tá tú velur 30. apríl, vel øðrvísi, vel eitt umboð sum veruliga umboðar oynna á løgtingi, vel Miðflokkin.

Føroya Tele fantilsið av samgonguni

Thomas Arabo
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi

Lichtenstein royndi tað, ið onkur vil gera við Føroya Tele, við vánaligum úrsliti. Alt hetta tosið um at petta almennar fyritøkur sundur, má merkja, at starvsfólk gerast ótrygg, og eigur slíkt at vera manað í jørðina beinanveg. Skal nakað seljast, so má tað vera í heilum líki, og ikki dekkast sum eitt búgvið borð til spekulantar at taka tað lønandi, meðan landið og Palliba sita eftir við undirskotinum.

Kapping má verða á jøvnum føti

Kapping má merkja, at Føroya Tele sleppur at kappast eins og einhvør onnur privat fyrtøka, so prísirnir koma enn longur niður til gagns fyri brúkaran. Vit í Javnaðarflokkinum trúgva ikki uppá, at kapping merkir eitt sjálvtøkuborð fyri tey fáu av almennum rovum.

Privatisering kann altíð diskuterast

Privatisering kann altíð diskuterast, men vit í Javnaðarflokkinum hava ikki tiltrúgv til motivini hjá Fólkaflokkinum, og tí eru vit á varðhaldi. Skattgjaldarin í Føroyum eigur forteknningarrætt, um partabrøv í eitt nú Føroya Tele, Føroya Banka og Fiskavirking skulu seljast. Man kann ikki hava nakað ímóti, at fyritøkur gerast fólkaogn, men nøkur full privatisering kann neyvan verða talan um tey fyrstu nógvu árini, uttan at prísurin verður ov lágur ella útlendingar mugu uppí - og tað er so aftur ein annar spurningur.

Kursurin hevði skramblað niður

Eg má siga, at eg eri glaður fyri, at eingin partabrævamarknaður er í Føroyum í dag. Partabrøvini í Føroya Tele og Fiskavirking høvdu farið í botn, eftir útmeldingunum frá Bjarna Djurholm og Vinnumálastýrinum seinastu tíðina. Vel lista C og fá ábyrgd aftur í Vinnumál.

Miðflokkurin sum verji teirra veiku

Anna Dam
Valevni Miðfloksins í Suðuroy

Hóast hann var í andstøðu, so eydnaðist Miðflokkinum í farna valskeiði at fáa samtykt uppskot um bata til felagsskapir, sum virkaðu til verju fyri tey, ið vegna ymisk brek illa megna at verja seg sjálvi.

Niðanfyrinevndu dømi av mongum vísa betur enn orð, hvørjum "hjarta" Miðfloksins brennir fyri!

Eitt av seinastu uppskotum Miðfloksins var at fáa sett játtan á figgjarlógina at stuðla felagsskapum, sum virka fyri teimum, ið misbrúkt eru kynsliga. Tvær ferð í desembur fullu uppskot floksins, men tá royntvarð aftur í mars, eydnaðist at fáa sett kr. 200.000 av til slíkar umsóknir.

Summir politikarar og fjølmiðlar skíra hetta virksemi floksins fyri "at halda gildi", tað kunnu vit saktans liva við, men tað er ein skomm fyri teir. Júst hetta økið, kynslig misnýtsla av børnum, áttu fjølmiðlar okkara at viðgjørt, heldur enn at speireka tey, ið vilja rætta eina hjálpandi hond!- tí størri brotsverk enn hendan misnýtsla finst neyvan.

Felagsskapirnir Sinnisbati og Javni virka fyri teimum, ið á ymiskan hátt eru tarnaði og illa megna at skipa dagligu tilveru sína. Tí var tað natúrligt fyri Miðflokkin fyri árið 2000 at gera avtalu við landsstýrið um at stuðla figgjarlógini, treytað av at landsstýrisflokkarnir stuðlaðu uppskotum Miðfloksins um at veita hesum felagsskapum figgjarligan stuðul á løgtingsfiggjarlógini. Fyri Sinnisbata var talan um nýjáttan, fyri Javna var talan um munandi hægri játtan.

Fyri Miðflokkin var talan um hjartamál, og vit vilja halda fram á hesum øki eftir valið, vónandi í nógv størri mun við fleiri tingfólkum og í samgongu.

Miðflokkurin er ikki kendur fyri at sáa um seg við vallyftum, men tvey mál hava okur sett okum fyri at fáa framd so skjótt okur koma í samgongufyrst at fáa settan landsstýrismann í trivnaðar- og familjumálum, harnæst at hesin, innan 1/2 ár, skal hava fingið loysn á skúlalæknaspurninginum, so at skúlalækni verður settur fyri alt Føroyar

Men avgerandi er, at tú ikki bert er samd(ur) við okkum, men at tú eisini velur øðrvísi hesuferð, setir kross tín fyri lista H valdagin.

Veljið kvinnur í løgtingið

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins

Við seinasta val vóru 28 menn og 4 kvinnur valdar. Hetta er eitt ófatiliga skeift býti. Er tað veruliga so, at vit føroyingar eru so fundamentalistiskir og so konservativir, at vit halda okkum kvinnur vera minni verdar? Ella halda føroyingar framvegis, at kvinnur einans eiga at taka sær av heiminum og tiga í samkomum? Vilja vit framhaldandi góðtaka eitt slíkt býti?

Fyri meg er tað beinleiðis skakandi at síggja, at støðan er, sum hon er. Hetta førir eftir mínum tykki til eitt sera skeift kjak, har kvinnuligu sjónarmiðini mangla, og at Føroyar fara haltandi inn í nýggju øldina.

Av tí sama hevur kjakið mest snúð seg um vegir, tunnlar, fiskidagar, ferjur og slík mál, sum fáa smádreingin fram í monnum.

Trivnaðarmálini, so sum íbúðarmálini, eldramálini og barnamálini hevur verið lítið tosað um. So gott sum einki hevur verið gjørt við hesi mál seinasta valskeiðið. Men til hetta valið hevur Javnaðarflokkurin sett hesi mál fremst í valskránna. Og eiga hesi mál eisini at fáa fremstu raðfesting í eini komandi samgongu.

Tá trivnaðarmál eru sett ovast á dagsskránna, eigur tú eisini høvi til at velja fleiri kvinnur á ting. Tí trivnaðarmál liggja fremst í huganum hjá kvinnum. Harafturat fáa vit eisini nøkur kvinnulig sjónarmið til mál, sum vanliga verða mett sum rein mannlig mál. Kanska vísir tað seg, at vit tá finna loysnir, sum vit annars ikki høvdu funnið. Og at sloppið verður undan skeivleikum, sum annars høvdu verið ókomnir.

Góðu føroyingar! Farið á val og vísið, at vit eru eitt framkomið land - og ikki eru eitt tilafturskomið og konservativt fólk.

Farið á val og veljið Javnaðarflokkin. Setið X við lista C. Setið X við eina kvinnu.

www.lindenskov.com
Veljið kvinnur í løgtingið

Suðuroyingar aftur við skerdan lut

Jákup Olsen
Valevni Fólkafloksins í Suðuroy

Fullvæl veit eg, at okur fáa ein nýggjan Smyril, og tað eru okur takksom fyri, men líka mikið, um tað er ein nýggjur – ella gamal Smyril, ella tað er eitt ella annað Landsstýrið, sum situr, so verður Suðuroyggin lammað, hvørja ferð ein streika er. Alt steðgar upp her suðuri. Suðuroyggin verður løgd lamin, so eingin vøra ella nakað annað kemur til oynna. Eingin flutningur av ferðafólki og heldur ikki okra útflutningsvøra sleppur av oynni. Hetta hendir ferð eftir ferð. Hví skal Suðuroyggin verða tikin gísli hvørja ferð? Hvat hava okur suðuroyingar gjørt til saka, at alt skal ganga út yvir okkum, bara tí menn ikki kunnu semjast, hava teir ongan semingsanda í sær? Tað sær soleiðis út, at Suðuroyggin altíð skal nýtast sum ein partur av streikuni. Trýstið frá fakfeløgunum og sitandi figgjarmálaráðharra skal bara ganga út yvir suðuroyingar, tað hvørki kann ella skal vera meiningin. Suðuroyingar kundu bara gjørt eitt, teir kundu bara tikið Smyril og siglt við honum, men hesa ferð kundi hetta ikki lata seg gera, tí menn vóru so snildir, at teir løgdu hann í Havn og ikki á Drelnesi, men einaferð verður tolið hjá ogum uppi.

Karstin fría okkum frá gíslatøkuni!

Eg fari hervið at heita á fíggjarmálaráðharran, Karstin Hansen, sum hevur verið tann figgjarligi partur í samráðingunum, um at fría okkum suðuroyingar frá gíslatøkuni. Vit skilja eisini tína støðu, Karstin Hansen, men álvaratos, hvat er meiningin, tí norðanfjørðs virkar alt normalt, meðan Suðuroyggin verður rakt, hvørja ferð streika er. Fá okkum Smyril aftur í sigling skjótast gjørligt ella eitt annað skip, tí okur suðuroyingar hava als ikki uppiborið slíka ósømiliga viðferð.

Útjaðarin aftur á føtur

Mikkjal Sørensen
valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Suðuroyggin hevur ikki verið forkelað, tá tað ræður um útbygging, nútímansgerð ella viðlíkahald av vegakervi og havnum. Hetta ásannar ferðamaðurin mangan undrandi á síni fyrstu ferð í Suðuroynni og ítróttarfólk kring landið kenna støðuna. Her eru oyggin eftirbátur og hetta kann ikki halda fram. At Suðuroyggin er fleiri ár aftanfyri restina av landinum viðvíkjandi farleiðum á sjógvi og landi, kann hvørki fólk ella vinnulív longur góðtaka og her má broyting koma í.

Miðstaðarøkið er í vøkstri og farleiðir styttast. Tunnil undir Vestmannasund er veruleiki og fyrstu stigini eru tikin til tunnil undir Leirvíksfjørð. Tá eru ikki nógvar av stóru strandfaraleiðunum eftir.

Og hvat er tá meira náttúrligt, enn at avgreiðslan av Smyrli verður flutt til Suðuroyar?

Annað vandamál merkja vit í Suðuroynni í hesum døgum. Tá verkfall er, so er tað nærum bert ein partur av landinum, ið merkir avleiðingarnar, nevniliga Suðuroyggin. Her eigur at verða skipað so fyri, at viðurskiftini verða broytt, so hesin eintáttaði vani ikki heldur fram, fólki og vinnu í oynni til miklan ampa.

Avskipanarmøguleikarnir mugu fáast í betri legu. Framleiðslan í Suðuroynni í dag steðgar á middegi tórsdag, tí soleiðis er farmaleiðin løgd tilrættis. Atlit verða tikin til miðstaðarøkið, ikki útjaðaran.

Lat okkum fáa boyting í hesa vanahugsan, øllum pørtum at gagni. Lat okkum veruliga fáa útjaðaran við aftur við ítøkiligum ætlanum og tilrættalegging.

Álit eru skrivað um útjaðaran seinnu árini, men lítið av ítøkiligum politikki hevur verið at sæð.

Brúk er kanska fyri at lýsa ymsar støður og at gera kanningar, gamaní, men hetta loysur ongar trupulleikar. Brúk er fyri ítøkiligum átøkum og ikki orðaskvaldri og álitum, ið oftast savna dust í skrivibordsskuffum í miðstaðarøkinum.

Brúk er fyri, at atlit verður tikið til útjaðaran, ikki bert miðstaðarøkið. Broytingar eru her neyðugar, skal endin ikki gerast, at øskukalt er í útjaðaranum.

Útoyggjamenning í Norðuroyggjum

Heini O. Heinesen
tingmaður Tjóðveldisfloksins

Svínoy

Nógv hevur verið tosað um, hvussu vit kunnu menna útoyggjarnar í norðoyggjum. Her hugsi eg serliga um Fugloynna og Svínoynna.

Svínoyggin er frá natúrannar hond væl betri fyri enn Fugloyggin, av tí at hon liggur nærri meginlandinum. Herafturat er eitt stórt arbeiðspláss í Svínoy í sambandi við aling. Hetta arbeiðspláss, og tann mjólkaframleiðsla sum er í oynni, hava tørv á betri flutningsmøguleikum. Bygdaráðið í Svínoy hevur í fleiri ár sent skriv til Løgtingið um at fáa tunnil yvir í Havnina, sum er kyrrasta pláss í oynni. Har eru eisini møguleikar fyri at gera eina ferjulegu við eini minni havn. Vit kunnu eisini nevna sjógvaling út frá hesi havn. Ein slík íløga kundi verið gjørd yvir fleiri ár. Eg kann taka dømi av tí sum verður gjørt til Gásadals. Her hevur Løgtingið játtað 8 milliónir um árið í tvey ár. Fyri henda pening rokna teir við at skjóta íggjognum. Vit kundu gjørt á sama hátt í sambandi við at gjørt ein tunnil íggjognum Svínoynna. Hetta hevði loyst teirra trupulleikar við flutningi av ferðafólki og farmi.

Fugloy

Fugloyggin liggur verri fyri enn Svínoyggin, men tað eru ávisir møguleikar at menna oynna. Tað hevur verið tosað so nógv um vindmyllur í seinastuni. Her skuldi verið góðir møguleikar fyri at sett eina vindmyllu. Tað sum eg kundi hugsa mær var serliga at brúkt orkuna til at skapt arbeiðspláss í Fugloy. Her er tað aftur alingin, sum kundi verið brúkt. Henda alingin átti at fari fram uppi á landi, við at sprongt hyljarnar niður í lendið. Orkan frá mylluni kundi so verið brúkt til at pumpa sjógvin upp í hyljarnar. Hesi alibrúk hava tann fyrimun, at tey kunnu sóttreinsast. Um ein slík íløga verður gjørd, verður hon verandi so leingi hon verður hildin viðlíka. Her eru fleiri fyrimunir, tí viðlíkahald er so gott sum einki. Tað kann eisini henda, at ein partur av alivinnuni fer at fara fram uppi á landi fyri at sleppa undan sjúku. Herafturat slepst undan tí dýru útgerðini, sum aling á sjógvi hevur við sær.

Tað nyttar ikki nakað sum helst at tosa um útoyggjamenning, um eingin ætlan er við útoyggjunum.

Kallsoy

Kallsoyggin er ikki nøkur útoyggj, men allíkavæl verður hon enn í dag røkt sum ein slík, tá talan er um ferðamøguleikar til og frá. Men nú hevur Løgtingið so játta pening til ferjulegu á Syðradali. Játtaðar eru 16 milliónir til hetta arbeiði. Nú er so eftir at finna bestu loysnina. Vit vóru ein tíð har í vikuni, men eg má siga, at tað restar nógv í til at siga, at komið er á mál.

Tað er tí umráðandi at fáa gjørt ferjuleguna sum skjótast. Hetta fer at gera tað høgligari at flyta tung amboð í og úr oynni í sambandi við asfaltering.

Skulu vit hava fólk búgvandi í útoyggjunum, er tað umráðandi at stilla teimum nakað sikti at síggja fram til.

Hetta er nakað av tíð sum eg fari at virka fyri, um eg verið afturvaldur tann 30. apríl.